átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**Jógvan Zachariassen, Hoyvík**

## Heilagi Andin virkar við kraft

Hvítusunnan minnir okkum á, at Heilagi Andin virkar við kraft og myndugleika kring heimin í dag.

Heilagi Andin livir í hvørjum einstøkum trúgvandi, og ynski Hansara er at leiða lív okkara soleiðis, at vit liva saman við Harranum Jesusi, Gudi til dýrd.

„Vita tit ikki, at likam tykkara er tempul Heilaga Andans, sum í tykkum er, og sum tit hava frá Gudi, og at tit eru ikki tykkara egnu?" (1. Kor. 6:19).

Grundarlagið undir allari læru um Heilaga Andan finst í svarinum til henda spurning: Hvat pláss gevur Hann Jesusi Kristi?

Høvuðsuppgáva Heilaga Andans er at dýrdargera Frelsaran (Jóhs. 16:14). Heilaga Andin gevur Jesusi Kristi ta støðu og dýrd, sum Hann hevur uppiborið.

Og loyva vit Gudi at leiða okkum, so fer Heilaga Andan at hjálpa okkum at lyfta Hann, sum doyði og reis upp aftur frá hinum deyðu fyri okkum, hægri í heiður og dýrd."



# - Heilagi andin gevur lív

**- Tá Guds andi kemur inn, verður kenslulív okkara heilt, sigur danski fólkatingslimurin, Bodil Kornbek, sum her sigur frá hugsan síni um hvítusunnuna**



*- Heilagi Andin verður ofta lýstur sum ein vindur ella sum ein dúgva, sigur danski politikarin Bodil Kornbek*

**Danmark:** - Allar høgtíðirnar í kirkjuni hava sín týdning. Bæði jólini, páskini og hvítusunnan hava ein boðskap við stórum týdningi fyri meg, sigur við Kristelig Dagblad.

Bodil Kornbek, sum er formaður í flokkinum Kristendemokraterne metir hvítusunnuna vera er ein áminning um komuna hjá Heilaga Andanum.

- Vit hava øll brúk fyri onkrum at hella seg ímóti. Heilagi Andin, Guds andi, er hann sum eg vendi mær ímóti. Hesin andin er lívgevandi.

At andin er lívgevandi merkir fyri Bodil, at tá Guds andi kemur inn verður kenslulív okkara heilt. Guds andi uppmuntrar. Guds andi gevur gleði. Guds andi fyllir okkara innara lív, og tað gevur frið og sælu.

Sjálv heldur hon høgtíðina saman við familju síni. Og kirkjugongd er ein natúrligur partur av hvítusunnuni, eins og hon ger tað hvønn sunnudagin.

- Fyri meg er hetta ikki petti øðrvísi enn vanligt, sigur hon.

### Ein dúgva

Týdningarmesti boðskapurin á hvítusunnu er, at Heilagi Andin varð sendur til jarðar, eftir at Jesus var farin til himmals.

- Heilagi Andin er sum ein tulkur, sum ger at eg kann hoyra og skilja orðini hjá Jesusi.

- Við at senda Heilaga Andan hevur Jesus soleiðis víst sína umsorgan fyri mær í øllum lívsins viðurskiftum. Ja, tað merkir, at í øllum lívsins støðum er tað ein, sum heldur mær uppi. Og tað er ein styrki fyri meg.

*Hvítusunnan kann tykjast abstrakt. Hevur tú eitt boð uppá, hvussu hvítusunnan kann verða formidlað inn í ein gerandisdag í 2008?*

- Heilagi Andin verður ofta lýstur sum ein vindur ella sum ein dúgva. Tað kann ofta vera ein hjálp at brúka alskyns myndir, og sum kunnu lýsa Heilaga Andan og harvið geva, serliga teimum ungu, eina størri fatan av hesi stóru kristnu hátíðini, sigur Bodil Kornbek at enda í samrøðuni.

## Hvítusunna

Høgtíð hildin til minnis um, at heilagi andin kom yvir ápostlarnar (Ápostlasøgan 2, 1-13).

Navnið "hvítusunna" kemur av, at í fornkirkjuni var hetta dópstíðin fram um aðrar, og av teimum hvítu klæðunum, sum tey, sum vórðu doypt, vóru í.

Navnið hvítusunna vinnur sær rætt í gomlu ensku kirkjuni, og haðani kemur tað til Noregs, Føroyar og Íslands. Men tað navnið, sum annars vann fram í flestu europeisku londunum var orðið, sum til dømis á donskum er "pinse". Og tað kemur av grikska orðinum "pentekoste", ið merkir 50. dagurin eftir páskir.

Høgtíðin, ápostlarnir komu saman á, var annars gomul jødisk takkarveitsla fyri hveitiskurðin. Men í kristnu kirkjuni fær høgtíðina so ein annan dám og týdning. Tað er annars ikki so langt síðani, at tú í Føroyum kundi koyra fólk ynskja "gleðiliga pinsafest", men tað man ikki hoyrast longu.

Føroyska navnið á høgtíðini hevur so altíð verið hvítusunna.

*(Kelda: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

# Oprah betri umtókt enn pávin

**Á fyrsta sinni er ikki pláss til pávan á einum lista yvir 100 teir mest týðandi persónarnar í heiminum í dag**



*Oprah Winfrey er kend sum sjónvarpsvertur. Og líkt er til, at fólk eisini dáma hana væl*

**USA:** Sambært einum lista í amerikanska tíðarritinum Time Magazine eru persónarnir býttir upp í fimm bólkar, millum annað ein um leiðarar og kollveltingarfús. Her finnur ein millum annað Dalai Lama, Vladimir Putin og George W. Bush.

Men í einum øðrum bólki finnur ein kenda filmsleikarin Brad Pitt, sjónvarpsvertin Oprah Winfrey og rokktónleikarin Bruce Springsteen.

Tað áhugaverda í hesum er, at pláss er ikki til pávan í hesum listanum, sum hevur verið almannakunngjørdur síðani 2004. Hesi tíðindini fegnast ein kortini um í Vatikaninum:

- Eg fegnist um hetta, tí tey hava brúkt eitt metingarstøði, sum einki hevur við átrúnaðarliga ella moralska autoritet pávans at gera. Av hesi orsøk haldi eg, at tað er positivt at ein ikki samantvinnar autoritetin og tænastuna hjá pávanum við eina meiri verðsliga natúru, sigur talsmaðurin hjá Vatikaninum, Federico Lombardi.

Oprah Winfrey er tann einasta, ið hevur verið á listanum øll árini.

## Hvítusunnuvinir hittast til stevnu

**Havn:** Aftur í ár verður skipað fyri Hvítusunnustevnu, sum verður hildin í Havn undir heitinum: „Veitst tú ikki, at alt mítt er títt?". Tað eru Evangeliihúsið og Filadelfia saman, ið skipa fyri stevnuni. Øll møtini verða hildin í Filadelfia, meðan familjutiltakið verður hildið í Evangeliihúsinum.

## Møtir kring alt landið

**Heimamissiónin:** Hesa høgtíðina skipa mong ymisk missiónshús fyri stevnum. Á Sandoynni verður stevna í Húsavík, og í Suðuroy stevna í Vági. Annars verða vanlig møtir í flestu missiónshúsunum kring landið.

## Stevna saman í Vági

**Brøðrasamkoman:** Í mong ár hava samfelagsmøti verið hildin á skift millum Vág og Klaksvík. Hesaferð byrja møtini í Bethel í Vági í kvøld, men halda síðani fram í ítróttarhøllini restina av høgtíðini. Á skránni eru bæði uppbyggingarmøtir, evangelisk møtir og breyðbróting, alt krúddrað við sangkórum ymsa staðni frá. Leygarkvøldið og sunnukvøldið kl. 22.30 fara tey ungu at skipa fyri ungdómstiltaki í Bethel.

## Føroysk hvítusunna í Danmark

**Esbjerg:** Aftur í ár skipar føroyski trúboðarin, Heri Elttør fyri møtum í missiónshúsinum Bethania í Esbjerg á hvítusunnu. Møtini byrja í kvøld og halda fram til sunnudagin. Høvuðstalari verður Thomas Dam, formaður í Heimamissiónini. Eitt líknandi tiltak varð roynt í fjør í Hirtshals við góðum úrsliti.

## Stevna í skúlahøllini

**Kollafjørður:** Fólk á meginøkinum fáa eisini høvi at fara til stevnu hesa høgtíðina. Í gjárkvøldið byrjaði nevniliga ein stevna í skúlahøllini í Kollafirði, sum stýrið fyri missiónshúsið skipar fyri. Talarar og sangarar koma ymsastaðni frá. Eftir hvørt møti verður opið hús í missiónshúsinum við fríum vitnisburði og sangi.